# Keypið jólagávuna á alnetinum

Alnótsbarnahandilin Kúllurin & Gellan, www.kulgel.com, ið lat upp fyri hálvum ári síðani, hevur fingið góða móttøku. So hvørt, sum vøruúrvalið í handlinum er støðugt vaksið, er sølan tað eisini.

Í útlondum keypa nógv jólagávur á alnetinum. Hetta ber eisini til hjá Kúllinum & Gelluni, og fyri at gera tað enn lættari, skulu kundarnir í jólamánaðinum ikki rinda postgjald, um keypt verður fyri meira enn 500 kr.

Handil á alnetinum er í rúkandi menning kring heimin. Orsøkirnar eru millum aðrar, at kundin sleppur undan at standa í bíðirøð, at leita eftir parkeringsbái og at bera vørurnar heim. Fyri at koma inn í handilin, skal kundin bara tøppa www.kulgel.com.

Harafturat kann kundin í friði og náðum – við telduna heima ella aðrar staðir – leita eftir gávum/brúkslutum og síðani bíleggja. Vøran verður síðani goldin umvegis peningastovn ella FR-kort og at enda latin til dyrnar. Ella avheintað.

Kúllurin & Gellan selur fleiri kend vørumerkir sum t.d. Babybjørn og Thilde úr Svøríki. Tinyzone, Gaia & Ko, Babynap og Mala úr Danmark. LeleFashion úr Týsklandi. Og BeSafe úr Noregi.

Vælumtóktu blusurnar og buksurnar úr merkinum Mala, beriselarnir frá Babybjørn, leðurskógvar frá Tinyzone og puslitaskur frá Gaia & Ko eru nakrar av vørunum, ið kunnu keypast á www.kulgel.com.

Kúllurin & Gellan leggur stóran dent á, at vørurnar eru prískappingarførar, og at vøruúrvalið er breitt og annarleiðis. Donsku vørurnar verða tí seldar til somu prísir sum í Danmark.

So hvørt nýggjar vørur eru at fáa til keyps, verða eisini tíðindabrøv send út. Tekning til tíðindabrøvini fer fram á www.kulgel.com



























